# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Headache á G!

Leygardagin klokkan 16:00 verður Headache Blues Treo at hoyra á G! Festivalinum. Teir fara at spæla bluestónleik, serliga føroyskan, á minna pallinum omanfyri Gøtusand.

Manningin í Headache Blues Treo telir tríggjar mans: Uni R. Debess, sang og gittar; Edvard Nyholm Debess, bass; og Rógvi á Rógvu, trummur. Tað verður mett, at teir tríggir "hava skapt sín egna norðuratlantiska stíl við rótunum í amerikanskum bluestónleiki fult varðveittum."

Headache Blues Treo hevur framført á Prix Føroyum og á ólavsøkukonsertini í fjør. Teir góvu út fløguna Mr. Puffman í vár.

Lesið meira á www.headacheblues.com og www.gfestival.com.

**-hkm**

## Myndamaður í Stóra Pakkhúsi

**Rógvi Johansen hevur í hesum døgum myndaframsýning Stóra Pakkhúsi í Vági**

MYNDAFRAMSÝNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hósdagin kl. 17 byrjaði myndaframsýning í Stóra Pakkhúsi í Vági, har myndamaðurin Rógvi Johansen sýnir fram myndir. Rógvi greiddi, tá sýningin byrjaði, frá myndum og frá sýninginini.

Framsýningin fevnir um m.a. persónsmyndir, fornlutamyndir, landslagsmyndir, arkitektamyndir og reklamumyndir.

Framsýning er opin soleiðis: Hósdag–leygardag kl. 17.00-20.00, sunnudag kl. 16.00-20.00

Vágs Sóknar Bygdasavn skipar fyri framsýningini.

### 70 ára føðingardagur

Í dag, 9. juli, verður Malan Davidsen, hárfríðkanarkvinna, Klaksvík, 70 ár.

Føðingardagurin verður hildin í Tekniska Skúla, Nýggivegur, kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

**9. juli. Sostrata**. Hetta grikska kvinnunavnið er einki kent halgimennisnavn. Dagurin hevur borið ymisk onnur nøvn, men frá árinum 1726 kemur navnið Sostrata í álmanakkarnar.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt vístu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Maria Rønne Hansen**
**Kollafjørður**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, Marjun Bæk prest og øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.
Tøkk til øll tykkum, sum við at senda blómur, kransar og við at fylgja Mariu til gravar, sýndu henni seinasta heiðurin.

*Familjunnar vegna*
**Matthæus Andreas Hansen**

Kafé Blákrossstovan, Tórshavn:

# Poul Jacob Lundsbjerg nýggjur leiðari

**Mánakvøldið 5. juli 2004 var almenn móttøka á Kafé Blákrossstovuni í Havn í sambandi við at dagligi leiðarin á kaféini, Símun Joensen, fór frá, og Poul Jacob Lundsbjerg í tók við starvinum**



*Símun Joensen ( v.m.), sum hevur verið leiðari á Kafé Brákrossstovuni síðan november 1998, fer nú í annað starv á Blákrossheiminum, og Poul Jacob Lundsbjerg úr Fuglafirði hevur tikið yvir*

*Mynd: Kristian á Reynatrøð*

1. juli tók Poul Jacob Landsbjerg í Fuglafirði við sum leiðari á Kafé Blákrossstovuni í Havn. Í hesum sambandi var móttøka á kaféini mánakvøldið 5. juli millum kl. 20 og 23. Vanliga er sangkvøld á kaféini mánakvøld.

Poul Jacob tekur yvir eftir Símun Joensen, sum hevur verið leiðari síðan kaféin læt upp í november 1998. Hann fer nú í annað starv á Blákrossheiminum. Nógv fólk nýttu høvið at heilsa upp á Poul Jacob og Símun hetta kvøldið, og fleiri talur vórðu hildnar.

Poul Jacob er 63 ára gamal og fyrrverandi sjómaður. Hann hevur sjálvur verið alkoholmisnýtari, og ynskir hann nú at vera við til at hjálpa øðrum, sum hava hesar trupulleikar.

Kafé Blákrossstovan er ein deild av Bláa Krossi Føroya, sum er ein privatur hjálparfelagsskapur, ið m.a. hevur sum endamál at hjálpa menniskjum, ið eru illa fyri vegna misnýtlsu av rúsdrekka ella rúsevnum og royna at fyribyrgja at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni. Eisini verður virkað fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi og at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.



*Jaspur Langgard (h.m.) aðalskrivari á Bláa Krossi Føroya, handar her Símuni Joensen ein málning, sum Hilmar Højgaard í Saltnesi hevur málað, og takkar honum fyri trúgva tænastu*

*Mynd: Kristian á Reynatrøð*



*Á móttøkuni sungu systkini Steinhólm av Toftum, og Sverri Steinhólm, prestur, hevði eina andakt*

*Mynd: Kristian á Reynatrøð*

## Malan Davidsen 70 ár



Í dag, 9. juli 2004, fyllir Malan Davidsen hárfríðkanarkvinna í Klaksvík 70 ár.

Malan er ættað úr Klaksvík, dóttir Sigrid og Esbern Joensen (Esbern í Vági). Hon er yngst av fimm systkjum, fýra brøður eru eldri.

Hon fór til Havnar í 1955, sum 21 ára gomul, at læra til hárfríðkanarkvinnu hjá Juttu Andreasen, sum helt til á "Glade Hjørn".

Hon starvaðist í Havn til 1960, tá hon byrjaði við egnari hárfríðkanarstovu í Klaksvík.

Í 1962 giftist hon við Hans Andrias Davidsen, 'Hassadi', av Nesi, og fingu tey tríggjar døtur. Ansi, sum býr í Klaksvík, Eydnu, sum býr í Havn og Nitu, sum býr í Keypmannahavn. Hassadi andaðist í 1978.

Malan hevur arbeitt sum sjálvstøðug hárfríðkanarkvinna í 44 ár, og arbeiðir hon enn hvønn dag á "salongini". Eisini er hon ofta á sjúkrahúsinum, røktarheiminum og sambýlum og fríðkar hárið hjá teim eldru og sjúku.

Malan og Theodor Sólbjørg, sum bæði vóru einkjufólk, funnu saman í 1980. Theodor eigur 4 døtur, Birgit, sum býr í Noregi, Berthu, sum býr í Danmark, Sonju, sum býr í Søldafirði og Bryngerð, sum býr í Klaksvík.

Tilsamans eiga Malan og Theodor 18 ommu- og abbabørn.

Vit ynskja Maluni hjartaliga tillukku við degnum og eitt gott føðingardagshald á Skúlaheiminum í kvøld.

**xxx.**

# Vestanstevnan 2004

# Vælkomin og farvæl

**Eftir tólv ár í bygdarráðnum fer Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, ikki at stilla uppaftur. Tá hann nú býður stevnugestum vælkomnum, sigur hann samstundis bygdarráðnum farvæl**

KOMMUNAL-POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, gevst í kommunal politikki eftir komandi kommunuval.

Borgarstjórin í Sørvági býður øllum stevnugestum vælkomnum á Vestanstevnu. Sørvágur fer at gera sítt besta til, at fólk fáa eina góða og hugnaliga uppliving á stevnuni, sigur hann.

Samstundis boðar hann frá, at hetta verður seinastu ferð, hann fer at standa í fremstu politisku røð, tá skipað verður størri tiltøkum í bygdini.

– Eg havi altíð verið av teirri fatan, at ein skal gevast, meðan ein sjálvur klárar at finna hurðina. Mær dámar ikki politikarar, sum skulu berast út, sigur Eivin Jacobsen.

Eivin Jacobsen hevur sitið í bygdarráðnum í Sørvági í 12 ár, tá hetta skeiðið er runnið. Hetta seinasta skeiðið hevur hann verið bogarstjóri.

Ein tann seinasta stóra uppgávan, hann sum borgarstjóri hevur avgreitt, var undirskrivingin av samanleggingini millum Bíggjar- og Sørvágs Kommunur, sum fór fram í Tindhólmi tann 1. juli í ár. Við hesi samanleggingini er Sørvágs Kommuna vorðin tann størsta í Vágum. Eisini í fólkatali.



*Ein tann seinasta stóra uppgávan, Eivin Jacobsen sum borgarstjóri í Sørvági hevur avgreitt, var undirskrivingin í Tindhólmi av samanleggingini millum Bíggjar- og Sørvágs Kommunur*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Kommunan uttan fyri fyrireikingina

FYRIREIKING
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Sørvingar fyrireika seg til Vestanstevnu, eins og vanligt er, hvørja ferð, stevnan er í bygdini.

Fólk hampa og rudda. Mála og gera við. Og kommunan hevur eisini ymisk arbeiði í gongd.

Men Sørvágs Kommuna hevur einki við sjálva Vestanstevnuna at gera sum so, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági. Tað er ein serlig vestanstevnunevnd, sum tekur sær av tí praktiska í sambandi við stevnuna.

Hóast ein serlig stevnunevnd er, sum stendur fyri tí ymiska, sum hendir á Vestanstevnu, liggur Sørvágs Kommuna ikki á latu síðuni kortini, sigur borgarstjórin. Her verður ymiskt gjørt, sum kanska kortini hevði verið gjørt, men sum nú verður skundað eitt sindur undir, júst tí, at nógv fólk er væntandi til Sørvágs á Vestanstevnu.



*Sørvágs Kommuna fer at rudda økið millum Statoil og pakkhúsið hjá Hugo Fjørðoy, har ætlanin so er at byggja nýggjar egningarskúrar og aðrar hentleikar*

*Mynd: Edvard Joensen*

–Ikki tí, sigur Eivin Jacobsen. Tey arbeiði, kommunan hevur at gera, mugu taka ta tíð, tey hava fyri neyðini, og so má Vestanstevnan heldur fara framvið, um tað gerst neyðugt. Tí arbeiðið skal gerast ordiliga og ikki skundast igjøgnum kortini.

Sjálvandi verður altíð gjørt meira burtur úr enn vanligt, tá stevna er. Bæði kommunalt og privat. Fólk vilja fegin hava alt at síggja hampiligt og nossligt út hjá sær sjálvum eins og á almennum støðum og tað er eisini, sum tað eigur, sigur borgarstjórin í Sørvági.

Sørvágs Kommuna hevur ymsar verkætlanir, bæði á pappírinum og eisini í gongd, sigur borgarstjórin.

Arbeitt hevur verið seinnu tíðina við vegagerð, serliga umvælingum, í bygdini, sigur hann. Eisini onkur nýgerð av kommunalum vegi er í gongd í løtuni. Og tað er ikki smáting sum skal til, tá tosað verður um eitt nú asfaltering av kommunalum vegi í Sørvági. Góðar 10 kilometrar ella so hevur kommunana av kommunalum vegi at halda.

Eitt annað stórmál, sum Sørvágs Kommuna er í ferð við, er gerð av nýggjum dagstovni, greiðir borgarstjórin frá. Útbjóðingartilfarið er klárt, og borgarstjórin vónar, at tað kann latast út í august-september.

Talan er um eina íløgu upp á einar 10-12 milliónir fyri ein dagstovn, sum fer at hýsa umleið 100 børnum.

Borgarstjórin vónar, at tíðin kanska fer at hjálpa teimum eitt sindur, nú tað sær út til, at arbeiðið annars fer at minka hjá handverkarum.

Úti á havnarlagnum hevur Sørvágs Kommuna ætlanir um at gera nýggjar egningarskúrar. Eina egningarlon, sum borgarstjórin nevnir tað.

Talan er um at taka verandi skúrar, sum standa uttan fyri Statoil avgreiðluna, niður, eins og gamla pakkhúsið heiman fyri pakkhúsið hjá Hugo Fjørðoy eisini má víkja. Síðan verður bygt samanhangandi har ímillum, sigur Eivin Jacobsen.

– Hugsað verður sjálvandi í fyrsta umfari um sørvágsbátarnar, sigur hann. Men sjálvandi er ikki ómøguligt hjá øðrum at sleppa inn, um umstøðurnar annars loyva tí. Tað koma nógvir bátar á Sørvág at leggja upp, nú so høgligt er at koyra. Og verða egningarumstøðurnar góðar, kundi tað hent, at onkur kanska fekk sær fasta støð her, heldur hann.

Eisini er upp á tal at gera eitt nú alment wc og slíkt, sum tørvur er á á einum slíkum staði, sigur borgartjórin. Eitt nú siglir Súlan hiðani til Mykinesar um summarið, so her gongur nógv fólk ta tíðina.